# SOLEIÐIS ERU GÓÐIR VINIR

## 1. SPYR BARA

Hóast vinur tín sær púra kul út, kann væl vera, at alt innan í er ein fløkja. Spyr tí, hvussu hann ella hon hevur tað.



## 2. GÓÐTAK EITT NEI

Tað er í lagi, um vinurin ikki vil práta. Tað er kortini altíð gott at vísa áhuga, tí um vinurin fær hug at práta einaferð seinni, so veit hann, at tú ert til reiðar at lurta.



## 3. IKKI VERÐA BANGIN FYRI TÁRUM



Fer vinurin at gráta, skalt tú ikki gerast bangin. Tað er púra vanligt at gráta. Tað gera vit øll – eisini tey vaksnu.

## 4. IKKI BARA TAÐ ÓGVUSLIGA

Práta tit um tað ógvusliga, ið er hent – tað kann eitt nú vera, at vinurin hevur havt øgiliga sjúka ommu og sjúkan abba – minst tá altíð til at enda prátið við onkrum góðum. Práta tit bara um tað ógvusliga, kann tað vera trupult fyri vinin at halda á.



## 5. SIG TAÐ VIÐ EIN VAKSNAN

Tá ið tú hevur prátað við ein vin, sum er øgiliga keddur, er skilagott at siga tað við læraran. Tá ið fleiri vita, at vinurin ikki hevur tað gott, eru eisini fleiri, ið fáa hjálpt.



## 6. FLOKSINS EGNU GÓÐU RÁÐ

GG: Smittar korona framvegis, skulu tú og vinirnir halda frástøðu.

NÁM
novo nordisk fonden
reyðikrossur.fo